Fundur um útbúgvingina til grafikara

Í sambandi við at nevndin í Grafisk Fagligt Udvalg í Danmark kemur til Føroyar at vitja í døgunum 17. til 20. september verður skipað fyri almennum fundi, har greitt verður frá grafisku útbúgvingunum og nýggju útbúgvingini til miðlagrafikara (mediegrafiker).

Fundurin verður mánakvøldið, 18. september kl. 19 á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin.

Útbúgvingin til miðlagrafikara, sum byrjar í Danmark fyrst í komandi ári, kemur í staðin fyri grafikaraútbúgvingina, ið fyrst og fremst er ein útbúgving um, hvussu ymsir prentlutur verða gjørdir. Seinastu lærlingarnar eftir gomlu grafikaraútbúgvingini verða tiknir inn 1. januar komandi ár.

Nýggja útbúgvingin til miðlagrafikara, sum er ein vanlig lærlingaútbúgving, tekur umframt prentlutir eisini við samskifti, sum fer fram í digitalum og elektroniskum miðlum.

Hetta hevur við sær, at virkini, sum kunnu taka lærlingar í hesi yrkisgrein, gerast fleiri, millum annað vanlig grafisk virki, lýsingarstovur, multimediavirkir, teknistovur, bløð og onnur virki, sum fáast við samskifti.

Nevndin vitjar eisini virkir

Á ferðini her í Føroyum fer nevndin í Grafisk Fagligt Udvalg at hava fundir við føroysku yrkisnevndina fyri grafikarar. Danska nevndin fer eisini at vitja virkir í Føroyum, sum kunnu hugsast at verða góðkend sum læruplass til nýggju útbúgvingina.

Virkir, ið eru hugað fyri at fáa vitjan av umboðum fyri dansku og føroysku yrkisnevndinar dagarnar 18.-20. september, kunnu venda sær til Yrkisdepilin á telefon 35 50 50 ella við t-posti: depilin@yrkisdepilin.fo

Nývalda føroyska yrkisnevndin fyri grafisku yrkini hevur fýra limir. Nevndin hevur skipað seg við Jon Hestoy, sum formanni, Honnu M. Michelsen, sum næstformanni. Hinir limirnir í nevndini eru Eyðun Húsgarð og Anna Hansen.

Yrkisnevndin fyri grafiski yrkini er nevnd fyri yrkini grafikarar, prentarar, serigrafar, fotografar, miðlatøkningar og bókbindarar.

Føroyskir sløkkiliðsleiðarar

Í samband við ta skriving sum hevur verið um nýstovnaða felagið »Føroyskir sløkkiliðsleiðarar«, skulu her gerast nakrar rættingar so ongin »forvirringur« verður.

Fört verður fram, eftir at nýggja felagið er stovnað, er totalur forvirringur á brunaøkinum, men hetta er als ikki so. Um tað er totalur forvirringur, var tað eisini áðrenn.

Endamálið við nýggja felagnum er fyrst og fremst at menna og samansjóða sambandið og samstarvið ímillum føroyskar sløkkileiðarar. Hetta at vera í felagsskapi, hevur altíð verið mennandi og gott, og tá man samstundis hevur møguleika at samstarva út um landamørk, her verður hugsað um Grønland, Ísland og hini norðanlondini, so enn betur.

Fört verður fram, at eitt felag er frammanundan, og at tað mátti verið nógmikið. Til hetta er at siga, at tað er nú einaferð soleiðis at sløkkiliðsleiðarar hava eina nógv størri ábyrgd enn sløkkiliðsmenn og kann tað nýggja felagið kanska metast við eitt meistarafelag, meðan »Landsfelag Sløkkiliðsmanna« kundi líknað einum handverkarafelag, og eitt er vist, at eitt samstarv ímillum hesi bæði feløgini hevði givið góða frukt um vilji var tilstaðar.

Fört verður eisini fram, at nú verður klandur og rót at valda. Her má onkur álvarslig misskiljing verða komin í, tí felag okkara ynskir onki vald, men vil koma við ráðum og stuðla kommunum og land um tey heita á okkum. Fleiri av okkara limum hava holla útbúgving og nógv ára royndir innan sløkki- og bjargingararbeiði og kundi teirra vitan tískil verið til stóra hjálp nú ein tilbúgvingarætlan verður gjørd fyri bæði tunnlar og alt Føroya land.

Eisini verður fört fram, at arbeitt verður fram ímóti, at øll útbúgving av sløkkiliðsfólki, skal fara fram í Tórshavn, eisini hetta er heilt burturvið. At Havnin hevur val at geva sínum sløkkiliðsfólki eina størri útbúgving enn vanligt í Føroyum, kunnu vit bert fegnast um. Okkara felag fer at bíða við spenningi til úrslitið av arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum, ið settur er at smíðja eina tilbúgvingarætlan fyri Føroyar. Tá tey eru liðug við sítt arbeiði, koma tey eisini at seta út í korti, hvussu ein framtíðar útbúgving fer at síggja ú

At enda, er bert at vóna, at vit fara at fáa eitt gott og mennandi samstarv við Brunaumsjón Landsins og Landsfelag Sløkkiliðsmanna, landi og kommunum til frama.

K. Jacobsen,
Føroyskir sløkkiliðsleiðarar

Orðaskifti:

Nato-limaskapur

Ein spurningurin, sum er mest frammi nú, er hetta, at danski uttanríkismálaráðharrin setir seg ímóti, at løgmaður setir seg í samband við Nato aðalskrivaran og um danski uttanríkismálaráðharrin lýgur, tá hann sigur, at treytin fyri at verða limur í Partnership for Peace er, at landið hevur vápnaða hermegi.

Samgonguflokkarnir siga, at tað er einki løgi í tí, at landsstýrið roynir at útvega sær upplýsingar um treytir fyri limaskapi, meðan andstøðuflokkarnir siga, at landsstýrið ger sær fyri skommum við ikki at skilja, at uttanríkismál eru felags mál og verða umsitin av uttanríkismálaráðnum.

Eingin tekur uppá tunguna spurningin, um vit yvirhøvur skulu hava nakað við Nato at gera, tá Føroyar eru vorðnar fullveldi.

Sum støðan er í løtuni, so eru Føroyar umfataðar av nato-sáttmálanum sum ein partur av danska ríkinum, og hvat er so tann almenna politiska støðan í Føroyum til hetta:

Løgtingið samtykti 13. apríl 1940 at senda skriv til bretska hervaldið, har m.a. verður sagt: "Tað er støða tingsins at halda Føroyar uttanfyri bardagan og ósemjur landanna millum".

Í 1950 tók løgtingið ta støðu at seta seg ímóti, at skipað bleiv heimavernd "hjemmeværn" í Føroyum við teirri grundgeving, at heimavernd er eitt militert fyribrigdi og løgtingið ynskti ikki, at slíkur vápnaður stovnur verður gjørdur í Føroyum.

Í 1961 mótmælir løgtingið, at hermenn verða bundnir at radarstøðini á Sornfelli og loranstøðini á Eiði og ímóti at herútgerð verður goymd á føroyskum landella sjóøki.

Í 1969 legði ein løgtingsmaður úr Tjóðveldisflokkinum fram uppskot til samtyktar soljóðandi:

"Álagt verður Føroya Landsstýri at krevja av ríkisstýrinum, at Føroyar frá 1970 at rokna ganga úr Nato felagsskapinum."

Hetta uppskot bleiv ikki samtykt tá, men tingið avgjørdi at seta 7-manna millumtinganevnd við umboðum úr øllum flokkum at viðgera hetta mál.

Millumtinganevndin legði fram álit í august 1970 og sigur í innganginum til álitið m.a. soleiðis: "Føroyar hava eingi avgerðarrættindi í uttanríkispolitiskum málum. Landið er tó sum lutur av Nato samgonguni tað minsta og helst vegna sín lítilleika tað mest sárbara landaøkið innan Nato. Tað má tí haldast at vera okkara skylda at fylgja vith í øllum uttanríkis-, verndar- og friðarpolitikki uttanum okkum. Vit mugu gera alt tað, sum vit megna at veita okkara landi og fólki best møguliga tryggleikan.

Tað er út frá hesum sjónarmiðum Tjóðveldisflokkurin hevur reist løgtingsmál nr. 78/1968 Føroyar burturúr Nato."

Hetta síðsta er so tann grundgevingin, sum nevndin er samd um, at Tjóðveldisflokkurin hevur havt fyri uppskoti sínum.

Nevndin greiðir í álitinum frá roynd at gera skandinaviskan verjusáttmála, um Nato sáttmálan og um hvørji sjónarmið Noreg og Danmark og Ísland hava havt til henda sáttmálan.

Viðvíkjandi støðu Føroya sigur nevndin m.a. at eingin tingsamtykt er til skjals, sum hevur broytt tingsins støðu í hesum máli, nevniliga samtyktina frá 1940 og mótmælið frá 1960 móti herstøðum í Føroyum.

Endiliga sigur nevndin soleiðis:

"Við tí veldiga vøkstri í framleiðsluni av atomvápnum, sum farin er fram seinastu árini, í huga og við vissuni um, at eitt so lítið øki sum Føroyar er sera sárbart og ringt at verja, um atombardagi brestur á, ræður uppaftur meira um at halda Føroyar uttanveltaðar nú enn nakrantíð áður. Eingin ivi er um, at Føroyar eru betri vardar uttanfyri enn innanfyri hermálsligar samgongur."

Nevndin býtti seg í ein meiriluta og ein minniluta. Í meirilutanum vóru umboð fyri Javnaðarflokkin, Sjálvstýrisflokkin, Framburðsflokkin, Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin, meðan umboðið hjá Sambandsflokkinum var einsamalt í minnilutanum.

Uppskotið hjá meirilutanum er soljóðandi:

"Føroya Løgting biður landsstýrið siga ríkisstjórnini frá, at tað sambært løgtingsviðtøku frá 13. apríl 1940 er løgtingsins støða, at Føroyar verða hildnar uttanfyri ósemjur landanna millum og hermálsligar samgongur og at løgtingið sambært løgtingsmáli nr. 14/1960 mótmælir, at hermenn verða knýttir at Sornfellis- ella Eiðisstøðini og noktar fyri, at krígsútgerð verður goymd á føroyskum land- ella sjóøki.

Landsstýrið verður samstundis biðið um at heita á ríkisstjórnina um at kanna líkindini nú at seta hesa løgtingsviðtøkur í verk.

Úrslitið av hesi kanning verður at leggja fyri løgtingið í vetrartingsetuni 1970/71."

Uppskotið frá minnilutanum er minni víttgangandi, men mótmælir kortini, at hermenn verða knýttir at Sornfellis- ella Eiðisstøðini og at krígsútgerð verður goymd ella nýtt á føroyskum land- ella sjóøki.

Uppskotið frá meirilutanum varð samtykt við 15 móti 0.

Eingin løgtingssamtykt seinni hevur broytt støðu løgtingsins.

Vit eru fleiri, summi við heilum hjarta og summi við hálvum hjarta, sum hava gingið mótmælisgongur niðan í Mjørkadal og oman úr Mjørkadali, hildið talur og sungið ímóti radarunum á Sornfelli, limaskapi í Nato, atomdubbing o.s.fr. Minnist meg rætt, hevur tað líkasum verið tjóðveldissinnað fólk, sum hava verið á odda fyri hesum, meðan kanska onnur, sum ikki vóru so mótmælisgongusinnað, vóru við fyri at vísa, at tað nú ikki bara vóru tjóðveldismenn, sum vóru ímóti limaskapi í Nato o.s.fr.

Tað skal tó sigast, at tað var greitt, at tað ikki var alt Føroya fólk, sum stóð aftanfyri hesar mótmælisgongur, tí tað vóru mótmólmælí, sum m.a. meintu, at tað rætta hevði verið, at Føroyar komu inn sum beinleiðis limur í Nato og ikki sum ein partur av danska ríkinum.

Men sum sagt, støðan er tann, at eftir óbroyttum løgtingssamtyktum er tað framvegis løgtingsins vilji, at Føroyar skulu vera uttan fyri hernaðarsamgongur. Og tað er ikki tað, at málið er gloymt síðani 1070. Tað hevur í ymsum sambandi verið uppi so seint sum í 1995 og 1996.

Tað at vit vóru innlimaðir í Nato ímóti løgtingsins vilja og ikki sluppu út so leingi við vóru í ríkisfelagsskapi við Danmark hevur av tjóðveldisflokki verið nýtt sum eitt av dømunum uppá at vit máttu hava loysing.

Tað samsvarar eisini við hesa støðu, at landsstýrið rør uppundir, at Danmark skal rinda føroyingum endurgjald, fyri at hava nýtt føroyskt landøki til Natoútgerð og harvið vera sloppið bíligari sum Nato limaland.

Nú vit hava fingið eina meirlutasamgongu, sum hevur samtykt at vit skulu út úr ríkisfelagsskapinum, kundi ein vænta, at eitt av málunum var eisini at fara úr Nato.

Tað er tí ikki sørt ørkymlandi, at landsstýrissamgongan í sambandi við fullveldistilbúgvingina tykist at hava ta støðu, at Føroyar ikki kunnu standa uttanfyri nakra hernaðarsamgongu, men mugu velja og hava valt at vit skulu hava limaskap í Nato. Men ein viðgerð av hesum spurninginum í løgtinginum fyriliggur ikki, og løgtingið hevur tí ikki broytt tær samtyktirnar, sum gjørdar eru fyrst og fremst at vit skulu ikki vera við í nakrari hernaðarsamgongu.

Tað kann væl vera og er helst so, at ikki er neyðugt, at Føroyar hava ein vápnaðan her fyri at verða Nato limur, men at Føroyar skulu verða Nato limur, uttan á nakran hátt at luttaka, soleiðis at t.d. hernaðarútgerð ikki má finnast á føroyskum øki, tað ljóðar nú rættiliga ótrúligt.

Tað kundi verið áhugavert nú at fingið at vita, hvat er tað, sum ger støðuna ørðvísið í dag, ella hvør álvari lá aftanfyri tær løgtingssamtyktirnar, sum gjørdar vórðu. Tað verður torført at fáa svar uppá hetta síðsta, og av teimum, sum sótu í 7-manna nevndini, sum legði fram álit í 1970, er bert ein á lívi.

Nær eru teir politisku flokkarnir farnir at broyta meining á hesum øki? Eg haldi ikki, at limaskapur í Nato hevur verið uppá tal sum mál hjá nøkrum politiskum flokki, uttan at fara úr Nato, fyrr enn henda samgongan er skipað.

Men tað kann vera áhugavert at hyggja at, hvørjar grundgevingarnar vóru fyri at fara burturúr Nato, tá hetta málið varð reist í 1969.

Grundgevingarnar eru m.a. tað ringa árin, sum manningin í Mjørkadali hevur á viðurskiftini, at manningin drekkur, gongur við føroyskum konufólki og fremur óflíggjaskap av ringasta slag og í heila tikið hevur ringa ávirkan á umgdómin, sum veksur upp í Føroyum og at Mjørkadalsmenn selja brennivín, sum teir flyta inn uttan at gjalda toll. Men høvuðsgrundgevingin má tó haldast at vera henda:

"Út frá tí, sum frammanfyri er nevnt og teirri ómyndingaviðferð, sum Føroyum hevur verið fyri í øllum málum, sum hava við Nato at gera, er hugsan Tjóðveldisfloksins, at Føroyar hava nógvar og góðar grundir at biðja seg verða tiknar burturúr Nato samgonguni. Uttan at vit hava biðið um ella eru eftirspurd, eru vit drigin uppí hesa samgongu. Sjálvt í friðartíð er hon okkum ein meinur kleppur. Skuldi kríggj brostið á, verður støða okkara uppaftur verri, tí tá fær ein møguligur fíggindi grund til at leypa á einar herbúnar Føroyar, um hann ikki hevði gjørt tað, um landið ikki var herbúgvið."

Hvat er ørðvísið og hví er tað nú óhugsandi, at Føroyar ikki skulu vera í nakrari hernaðarsamgongu.

Og hvat er tað, Nato skal verja okkum ímóti?

Ein góðar fólkafloksmaður kallaði mótmælisgongufólkini niðan og oman úr Mjørkadali fyri "hentar idiotar". Vóru tey bara tað?

At enda: løgmaður hevur biðið Helveg loyva sær at venda sær til Nato. Hevði tað ikki verið hóskandi at spurt Føroya løgting?

Tórshavn, 13/9 2000
Kári Dalsgaard Petersen

Lesarabrævur:

Til Dan R. Petersen, løgtingsmann

Ikki eru vápnini pen, sum tú og føroyska andstøðan nýta mótvegis politisku mótstøðumonnum tykkara. Í heila tikið, so eru argumentini hjá tykkum farin at útvatnast við lít – har er næstan einki salt eftir. Tá er meiri stílur yvir andstøðuni í danska tinginum.

Í Sosialinum mikudagin brúkar tú sjey føroyskar hjartasjúklingar sum dømi um sambandsins herligheitir. Enn kann lívsneyðug hjálp fáast í Keypmannahavn, sigur tú.

Ríkissjúkrahúsið eigur lívið í mongum føroyingi, tað er púra vist. Hóast danska sjúkrahúsverkið í síni heild verðurdømt bæði niður og norður av danskarum sjálvum, so er tað gott hjá okkum at søkja okkum serhjálp har, táið á stendur – og sjálvsagt aðrastaðni við.

Tú fært tað kortini at síggja út, sum er henda hjálp ókeypis. Tað er hon jú sum kunnugt ikki. Vit gjalda har – sum í øðrum londum – fullan prís fyri ómakin. Eg fari at taka eitt fimm ára gamalt dømi:

Ein av mínum nærmastu skuldi hava skurðviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum í 1995. Eftir at allar kanningar vóru gjørdar, og alt var til reiðar, hendi kortini einki. Tá ið vit fóru at ótolnast, var svarið frá yvirsjúkrasystrini, at tey bíðaðu eftir pengunum úr Føroyum. Gjaldast skuldi frammanundan. Eg má siga, eg føldi meg illa. Vit bíðaðu í fimm langar dagar.

Um eg nú hugsaði/argumenteraði sum Dan R. Petersen, so hevði eg spurt: hvør hevði í grundini valdið í Føroyum í 1995? Hetta kom mær kortini ikki til hugs, fyrrenn eg sá grein hansara í Sosialinum mikudagin.

Oddvør Johansen
Tórshavn

Vilhjálmur Mohr Patursson

f. 03.10.1918 d. 13.08.2000

»Hvat gott veitst tú,« kundi Vilhjálmur spyrja, tá ið tú møtti honum ella, »Veitst tú einki nýtt?«

Síðan 1980 hava vit verið grannar, men eg hevði møtt honum áðrenn. Haldi tað var fyrst í sjeyti árunum, tá umvældi hann vegin til Kirkjubøar, har hann við vegjegaran hevði sett steinar, sum hann helt verða verdar at hyggja at. Nakrir standa uppi enn, og plagdi eg at vísa ferðafólki á teir, og gera vart við, at markið millum abstrakta list og gerandisdagin ikki er so stór, sum tað mangan verður gjørt til.

Møtti honum eisini til ymsar fundir. Hann tók ikki orðið í tíð og útfð, men tú gav tær far um tað sagda. »Tað mátti borið til« ella »men tit eru ung, tit skilja alt betur«. Tað er bara at fara til verka. Eg eri ein arbeiðsmaður og tað skammist eg ikki við,« segði hann einaferð og legði afturat:»Fólk halda enn, at ein arbeiðari er ein maður, sum gongur við einari trillibøru, hakkara og spaka.«

Villhjálmur var morgunmaður, og tú skuldi vera tíðliga á fótum fyri at síggja hann, um tú hugdi út, koma í sovukamarsvindeygað, draga gardinurnar frá og hyggja at verðinum. Tíðliga leygarmorgnar kundi hann vælhýrdur koma í handilin hjá Eli at keypa ein tubbakspakka ella eitt blað. Tá hevði hann longu verið uppi á Óyggjarvegnum og rudda kava. Ballaði eina sigarett, gav tær pakkan, segði frá onkrum ella spurdi, hvat eg helt um hetta og hatta, men áðrenn sigarettin var roykt, var hann farin. Hann tosaði ikki tíðina burtur, men fólkakærur sum hann var, støðgaði hann altíð á fyri at fáa sær eitt lítið prát.

Í 1981 var eg teir seinastu mánadagarnar av skúlaárinum lærari í Syðradali á Streymoynni. Tá koyrti eg ofta við teimum um vikuskiftini. Tað var stuttligt at uppliva, hvussu væl teir arbeiddu saman og sampakkau. Fyri teimum var arbeiðið eingin byrða. Teir fingu eina játtan um árið, og fyri hana kýttu teir seg á, at fáa so langt vegastrekki sum gjørligt.

Tá ið hann, farin um tey sjeyti, var farin frá, kundi hann ein góðan sunnudag biðja meg koma út at koyra. Nakrar ferðir fóru vit til Syðradals. Tá segði hann mær, at vegurin var teknaður upp eitt strekki annarleiðis, men hann hevði fingið hann broyttan, tí hann kom at liggja eins gott og var bíligari at gera. »Soleiðis er, teir eru góðir til sítt, men kunnu ikki vita alt, tá skuldu vit, sum eru praktiskir og nærri staðnum siga okkara hugsan. Er skil í, og teir eru skilagóðir, taka teir eftir tí. Teir vera ikki minni menn fyri tað, tvørturímóti.«

Ein maður segði fyri mær, nú Vilhjálmur var farin, at Vilhjálmur hevði sagt við Mikkjal Helmsdal.»Eg kann gera ein veg til Norðadals, sum verður brúkbarur, ódýrur, og at teir ikki noyast at bíða eftir honum í áravís« Í mong ár hevur vegurin verið til gleði og gagn. Tað síðsta arbeiði hann tók uppá seg, tá var hann fráfarin, var vegurin út á Bø við Kirkjubø. Har hevði hann so mangan gingið frá óvitaárunum av.

Nakað eftir at vegurin var liðugur bjóðaði hann mær við í bilin. Tá vísti hann mær á, hann heyði klovið eina bobbins at seta í eina á omanfyri vegin. Áin at Sálarbótará. Nú kundu fólk fáa sær ein vatndropa sum fyrr.

Tíðliga ein morgun um páskirnar kom hann inn og vildi vita, hvat eg helt um katolikkar, tá ið eg hevði svara honum, segði hann: »Vit báðir fara í katolikkakirkjuna í dag«. Og so var.

Dagin eftir ein ólavsøkudag fór eg og tveir vinmenn gangandi niðan við Sandá í besta summarveðri. Komnir niðan áraka trøðina hjá Vilhjálmi, sóu vit, at hann hoyggjaði og hevði nógv fyri. Vit ivaðust eina løtu, um vit skuldu órógva hann soleiðis, men beint sum hann fekk eyga á okkum, rópti hann okkum til sín. Hann bað okkum koma við inn í húsið, meðan hann fregnaðist um ólavsøkuna. Innkomnir gav hann okkum blíðskap. Ballaði eina sigarett og gav mær pakkan. Tá ið mín sigarett var hálvroykt, segði hann: »Eg má fara út aftur, men tit kunnu bara sita fyri tí.« Eg bjóðaði mær til at koma og hjálpa honum, men tað vildi hann ikki hoyra. »Far tú bara við teimum. Njót løtina og tað góða veðrið. Hetta er ikki meir enn eg havi at spæla mær við.«

Bara eini tvey ár eftir, at hann var givin at arbeiða, bleiv hann sjúkur, so trongur fyri bróstinum. Fólk óttaðist tað versta og harmaðist um, at honum ikki skuldi unnast nøkur góð ár aftaná eitt langt arbeiðslív, tí betur var sjúkan ikki illkynja, men hann fekk boð um at gevast við at roykja.

»Nei har var einki við at gera. Boðini vóru sólarklár. Tað fyrsta eg gjørdi, eg kom út aftur var at blaka alt sum eg hevði við royking at gera burtur. Tað var hart, men eg kláraði tað. Eg skuldi klára tað.«

Nakað eftir hetta segði hann fyri mær, at ein skildkona, sum hevði roynt at leggja av at roykja, var komin glað til hansara, nú hon hevði hoyrt um, at hann hevði klára tað, og hevði sagt: »Nú mást tú siga mær, hvussu eg skal gera.« Hann prikaði fleiri ferðir við fremstafinguri í bringuna og segði: »Hygg her tað er tú og bara tú, sum kann hjálpa tær, tú skalt siga við teg sjálvan: »Nú haldi eg uppat.«

Vilhjálmur var kirkjubøingur og góður við staðið og alla sína familju, men aldrin hoyrdi tú farran av reypi ella tíltíkt. At hava eitt so kent navn mundi ikki altíð vera stuttligt, men hann orkaði at bera tað og eisini verja tað um neyðugt. Bróðurin Jóannes, sum festi, varð ikki gamal maður. Vilhjálmur rak altíð við bróðursoninum, og frøddist um, at tað gekst honum væl, eisini tvíburðabróðrinum, Tróndi. Sjálvur hevði hann góðar hendur og eyga fyri standmyndum.

Vilhjálmur hevði nógvar góðar eginleikar, sum gjørdi fólki mun, ið møtti honum, men hann var eingin jabróður. Hann segið sína hugsan: »Vit eru ósamdir, tað er alt í lagi við tí,« kundi hann so siga við einum brosi.

Sum fólk flest var hann góður við síni, men konuna nevndi hann ofta. »Eg havi fingið eina góða konu,« kundi hann siga, og sum ein annar trúboðari boða, hvussu stóran týdning konan hevði fyri heimið.

Beint sum tað frættist, at Vilhjálmur var deyður møtti eg eini yngri konu, sum øll barna- og unglingaárini hevði verði næsti granni hansara. Hon helt eisini tað vera løgið, hóast árini vóru har, at hann ikki var longur. Mintist aftur á, at hon, sum var so nógv uppi í rossum, tað var hann eisini, plagdi at fara til hansara og sleppa út á trøðna við honum.Við einum fittum sorgkendum brosi, eitt sindur umskyldandi, segði hon: »Hann var sum ein hetja fyri mær«

Steinbjørn B. Jacobsen

Minningarorð

Birita Mohr

f. 22.09.89 – d. 06.05.2000

Tað er svárt at seta seg niður at skriva minningarorð um teg.

Tú komst sum ein sólstrála inn í familjuna hjá okkum, saman við pápa tínum og systrini. Tú og systir tín vóru ógvuliga tætt knýttar at hvørji aðrari og vóru ógvuliga góðar við pápa tykkara.

Við tíðini vórðu tit sum ein heild, mamma, pápi og børn. Tú fekst eina mammu, ið kom í móður stað. Í 1995 giftust pápi og mamma tín og vóru vit øll ógvuliga glað tykkara vegna, tí nú kundi bara ganga tykkum væl.

Tað var ógvuliga ringt at fata, tá ið mamma tín um kvøldið ringdi og segði okkum, at tú var ógvuliga sjúk, og tú kundi fara at doyggja. Tað fyrsta vit hugsaðu, tá ið vit vaknaðu um morgunin, var, at ongin hevði ringt, so nú mundi tað ringasta vera yvirstaðið, tá tú hevði klárað hesa náttina. Vit høvdu ikki meira enn hugsað hetta, tá telefonin ringdi og vit fingu boðini, ið ongin vildi hoyra – tú var ikki millum okkum longur.

Tú var full av lívi, og altíð hendi okkurt har tú var. Vit sita og hugsa um allar túrarnar vit hava gjørt saman. Altíð vart tú í góðum lag. Flogbóltur, fimleikur, súkkling og skótalív dámdi tær ógvuliga væl, og vóru allir vinirnir altíð saman við tær. Tú var ein íðin og góður skóti, eins og tær dámdi náttúruna væl – ein túr í hagan, í fjøruna at fanga krabbar ella í ánna at fanga síl. At syngja dámdi tær eisini ógvuliga væl, og fór tú saman við vinum tínum hvønn sunnudag í sunnudagsskúla ella í kirkju.

Tit fingu eina lítla systir, ið tú var ógvuliga góð við, og hon við teg. Nú sakna øll teg og leingjast eftir tær, men vita, at tú ikki kemur aftur, men er heima hjá Jesupápa.

Saknurin er stórur og tú verður ongantíð gloymd.

Góðu Anna Rúna, Leivur, Rani, Hildigarð, Durita, Sigrið, ommur og abbar og øll tit, ið stóðu Biritunær, má Harrin hjálpa okkum í hesi sváru tíð.

Signa mostir v/ familju